# Tangabilførarar til Magn

## Vit sóknast eftir tveimum tangabilførarum til Magn

**Um Magn**
Magn tryggjar orku til Føroyar og føroyingar. Vit eru 130 starvsfólk, svarandi til 80 ársverk. Høvuðsskrivstova okkara er í Havn og deildarskrivstovur eru í Klaksvík og á Tvøroyri. 10 service støðir bera Magn navnið, av hesum eigur Magn tær 4. Vit hava goymslur í Klaksvík og í Havn, og mált uppá sølu eru vit ein av Føroya størstu fyritøkum.

**Um størvini**
Eftir ávikavíst 43 og 36 ára drúgva og framúr góða tænastu, hava tangabilførarar okkara í Vágum og Norðstreymi valt at heilsa einum væluppibornum otium vælkomnum. Í hesum sambandi sóknast vit eftir tveimum røskum og fyrikomandi persónum at røkja hesar uppgávur.

**Økið 1:** er í Vágum, og verður hetta starvið sett pr. 1. desember 2010. Tó bíða vit fegin eftir tí rætta persóninum.
**Økið 2:** er í Norðstreymi, og verður hetta starvið sett pr. 1. februar 2011.

**Uppgávur í stuttum:**
- Útkoyring av olju til heim og virkir
- Útkoyring av diesel og bensini til Magnstøðir
- Útkoyring av olju til bátaannlegg
- Aðrar uppgávur í hesum sambandi

**Vit bjóða:**
Eitt gott, avbjóðandi og ábyrgdarfult starv í eini fyritøku í menning. Her er vítt til veggja, og um tú vilt og dugir, so sleppur tú eisini. Tað er avgerðandi, at tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt og at tú loysir tínar uppgávur væl. Av hesi orsøk fært tú góðan stuðul og alla neyðuga upplæring og útbúgving.

**Vit vænta:**
- At tú hevur stóra koyrikort „B" við viðkomandi royndum.
- At tú helst hevur kranaloyvi – tó ongin treyt.
- At tú ert tænastusinnað/ur og góð evni at samskifta og samstarva
- At tú hevur áræði, ert røkin og dugur væl at arbeiða sjálvstøðug.
- At tú eisini hevur møguleika og vilja at arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð
- At tú ert væl fyri kropsliga
- At tú helst býrt í teimum økjum uppgávurnar liggja.

**Okkara virði eru:**
- Kundin í fokus
- Vitan og førleiki leingi livið
- Skjótt er gott
- Gleði gevur megi.

Umsóknir skulu latast inn innan 23. november 2010.

Antin við at senda bræv til:
**Magn**
**Vestara Bryggja 10**
**FO-110 Tórshavn**
**Att.: Andrias Jacobsen**

Ella við teldupost til andrias@magn.fo

Sosialurin 341800

magn

***Hevur tú spurningar, vinarliga vend tær til Andrias Jacobsen, leiðari fyri útkoyringina á tel. 347470, 237470 ella á andrias@magn.fo***

**TÍN ORKA**

ber tað til at flyta pening um allan heim við 62°N?

nú er gjørligt at flyta pening til tíni nærmastu ella kæru um tey eru uttanlanda.

western union og 62°N klára hetta skjótt og einfalt!




WESTERN UNION | yes!

meira fæst at vita um western union hjá 62°N á tlf. 34 00 00.

westernunion.com
money transfer

service available at: 62°N